umhvørvisstovan

SUMBIAR KOMMUNA

POSTBOX 72
910 VÁGUR
FØROYAR

Argir hin 16. august 2011
Málsnr.: 10/00741-15
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Viðvíkjandi: Spillivatnsætlanin hjá Sumbiar kommunu er góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 16.08.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29 oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Sumbiar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

Umhvørvisstovan fekk hin 21.12.2010 spillivatnsætlanina til góðkenningar (mál nr. 10/00741-1). Ætlanin er gjørd av Pb Consult, ráðgevandi verkfrøðingum, og hevur Sumbiar kommunu góðkent ætlanina. Í sambandi við viðgerðina av ætlanini, hevur Umhvørvisstovan verið í samband við Pb Consult, og 29.06.2011 varð dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar (mál nr. 11/00741-10).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í spillivatnsætlanini, ið varð send 29.06.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn. Hetta merkir, at spillivatnsætlanin m.a. fevnir um spillivatn frá øllum húsarhaldum, virkjum og virksemi í kommununi, og at spillivatnið eftir reinsing verður leitt gjøgnum lokaða skipan beinleiðis á sjógv við góðum vatnskifti.

Sumbiar kommuna hevur tó, fyri Akraberg, søkt um undantak frá ásetingunum í § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn, sum sigur at spillivatn skal leiðast út á sjógv, og at spillivatnsleiðingar skulu í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru. Í Akrabyrgi er bert ein útleiðing og verður hon førd heilt oman til tromina á berginum har spillivatnið verður útleitt.

Undantakið verður givið við heimild í § 10 og 11, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn við fylgjandi grundgevingum:

1. í Akrabergi eru bert tvey summarhús og tveir virkisbygningar, og er útleiðingin tí lítil.
2. í Akrabergi er ógvuliga bratt og trupult er at fáa útleiðingina oman á sjógv og 1 metur undir.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, tvs. tann umhvørvisliga partin av spillivatnsætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensioneringin o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

Vinaliga

Jóhanna Olsen, stjóri

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri